# Ein biltúrur

### Anna Lisa, Ári og Klæni í ferðsluni

BÓKAÚTGÁVA
*Tíðindaskriv*

Ein biltúrur er liður í einum framhaldandi útgávusamstarvi millum Ráðið fyri Ferðslutrygd og Føroya Skúlabókagrunn. Hetta er onnur bókin um Onnu Lisu, Ára og Klæna í ferðsluni, og evnið hesa ferð er: -- Hvussu sita børn trygg í bilinum? Fyrra bókin var Á veg í barnagarð, sum kom út í fjør heyst. Katarina Nolsøe hevur týtt báðar bøkurnar úr íslendskum eftir Jón Ármann Steinsson og Jón Hámund Marinósson.

Ein biltúrur er eitt úrslit av virkseminum í Ferðsluringi Barnanna, sum Ráðið fyri Ferðslutrygd setti á stovn í 1984. Síðani tá hevur staðið øllum børnum í boði at fáa tilfar um ferðslu og ferðslutrygd.

Bókin er um tey bæði, Onnu Lisu og Ára, og vinmann teirra, Klæna, sum er rúmdarmaður. Tey trý fara at læra barnið ferðslureglurnar saman. Ætlanin við bókini er, at barnið skal læra at ansa sær í ferðsluni og at birta í kjak millum foreldur og barn um evnið. Í bókini verður eisini staðfest, at tað er ikki nóg mikið at sita við hús og læra um ferðslu við at lesa, barnið má eisini gera sínar royndir úti í ferðsluni. Børn læra best av at royna sjálvi. Fremst og aftast í bókini eru nágreiniligar leiðbeiningar til foreldur um skilagóða nýtslu av bilstóli, bilkodda og bilbelti til børnini í bili.

Umframt at bókin verður lisin heima við hús, er hon eitt gott íkast til frálæruna um ferðslutrygd í barnagarði og skúla.

Hestprent hevur prentað. Ein biltúrur er 16 síður og kostar 40 krónur í bókabúðunum.




*Tríggjar nýggjar barnabøkur eru komnar á marknaðin: Føroya Skúlabókagrunnur og Ferðslutrygd gava út bókina »Ein biltúrur«, meðan Bókadeild Føroya Lærarafelags gevur út bøkurnar »Dumbo« og »Vit telja og skriva tøl«*

# Klassikarin Dumbo á føroyskum

BÓKAÚTGÁVA

Dumbo er kendi klassikarin hjá Walt Disney, ið nógv ivaleyst kenna sum teknifilm. Hetta er søgan um fílin við teimum stóru oyrunum, ið er so óheppin og verður argaður, til Mús verður vnmaður hansara og lærir hann at flúgva.

Hesa útgávuna um fitta fílin Dumbo hevur Mathew Price skrivað, og myndirnar hevur Atsuko Morozumi teknað.

Sjúrður Gullbein týddi úr enskum. Bókin, sum er væl egnað til tey 3-8 ára gomlu, kostar 80 krónur í bókabúðunum.

# Vit telja og skriva tøl

### Til børn undir skúlaaldur, ið hava hug at læra

BÓKAÚTGÁVA
*Tíðindaskriv*

»Vit telja og skriva tøl« er stuttlig bók, ið ger tað lætt at læra og telja frá eitt til tíggju.

Við fittum tekningum og stuttligum uppgávum verður tað hugnaligt at læra at skriva tølini. Gandapennur fylgir við bókini, og tí kunnu tølini vaskast burtur og skrivast umaftur og umaftur. Bókin er sera væl egnað til børn undir skúlaaldur, ið hava hug at læra.

Tað er bretska forlagið Andromeda, ið hevur framleitt upprunabókina. Turið Kjølbro týddi úr enskum. Bókin kostar 120 krónur í bókabúðunum.





**Tímalærarar til Fiskivinnuskúlan**

Søkt verður eftir tímalærarum at byrja á Fiskivinnuskúlanum 1. august 2004 í hesum lærugreinum:

*Almennar lærugreinir:*
- Alisfrøði B-stig *(5 t/v)*
- Enskt C-, B- og A-stig *(4 + 4 + 5 t/v)*
- Fyriskipan A-stig *(4 t/v)*
- Týskt C-stig *(4 t/v)*
- Støddfrøði C- og B-stig *(5 + 5 t/v)*

*Yrkislærugreinir (nýggjar):*
- Alilívfrøði A-stig *(5 t/v)*
- Alitøkni B-stig *(4 t/v)*
- Framleiðslulæra, (í fiskavirking) B-stig *(4 t/v)*
- Havbúnaður, (alibúskapur) B-stig *(4 t/v)*

Umsøkjarar skulu hava prógv frá lærdum háskúla e.l., sum gevur førleika at undirvísa í lærugreinunum. Aðrir umsøkjarar kunnu tó eisini søkja. Tað er ein fyrimunur, at umsøkjarar til yrkislærugreinir hava undirvísingar- og vinnuroyndir, og at umsøkjarar til almennar lærugreinir hava undirvísingarroyndir.

Lønin er sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Yrkisfelag Studentaskúla- og HF-lærara.

Umsókn skal skrivast á serligt umsóknarblað, sum fæst á Fiskivinnuskúlanum ella frá Mentamálaráðnum. Meira fæst at vita við at venda sær til skúlastjóran á Fiskivinnuskúlanum.

Umsóknir við ljósprentum av próvskjølum o.ø. skulu vera skúlastjóranum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 23. apríl 2004.

FISKIVINNUSKÚLIN

Fiskivinnuskúlin
Postrúm 96
350 Vestmanna
Tlf. 424 573
fiskvest@fiskvest.fo

VASTI 457171


# Tvær semjur sama samdøgur

TÍÐINDASKRIV

Lønardeildin hjá Fíggjarmálaráðnum hevur gjørt semju við Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Føroya Tekniska Lærarafelag. Hitt serstaka er, at semjurnar fullu innan sama samdøgur

Samstundis, sum samráðingar eru millum Lønardeildina hjá Fíggjarmálaráðnum og Maskinmeistarafelag, er greitt, at semja er gjørt við Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Føroya Tekniska Lærarafelag.

Semjurnar við hesi bæði feløg vórðu gjørdar innan fyri sama samdøgur, ávikavíst tann 25. og 26. mars, og tað er rættiliga serstakt. Báðar semjurnar halda seg til lønarkarmin, sum er umleið 9 prosent í tvey ár.

Hjá sjúkrarøktarfrøðingunum hækkar grundlønin afturvirkandi 2,47 prosent tann 1. oktober 2003 og 3,90 prosent tann 1. oktober 2004. Hjá lærarunum á teknisku skúlunum hækkar lønin 4 prosent somuleiðis 1. oktober í 2003 og 2004.

Sjúkrarøktarfrøðingarnir hava avtalað, at tvey prosent av lønarupphæddini kunu brúkast til serligar frídagar. Tað merkir, at starvsfólk kunnu velja millum eina fríviku afturat ella at fáa lønina útgoldna.

Tekniskt Lærarafelag hevur avtalað samsýning fyri at vegleiða og próvhoyra sjálvlesandi.

Í báðum semjum er avtala um at fara undir skipaða førleikamenning.

Fíggjarmálaráðið og Maskinmeistarafelagið sita framvegis og samráðast um nýggjan sáttmála. Samráðingarnar fara fram undir leiðslu av semingsmonnunum Jógvan Amonsson og Alfred Petersen. Semingsmenninir hava útsett eitt møguligt verkfall til á midnátt í gjár, leygardagin 27. mars. Sáttmálin millum partarnar fór úr gildi 1. oktober 2003.

**ítróttur**

Nr. 62 • týsdagur • 30. mars 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

# Ungdómsvenjarin bleiv vaksin

**Undan kappingarárinum var ætlanin, at Svein Rógvi Nielsen burturav skuldi arbeiða við ungdóminum í Stjørnuni, men umstøðurnar lagaðu tað seg øðrvísi. Somikið øðrvísi, at hann leygardagin stóð sum meistaravenjari hjá besta kvinnuliðnum í landinum**

HONDBÓLTSPRÁT
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað vísti seg at vera ein heppin avgerð, sum leiðslan í Stjørnuni tók, longu tá trý umfør vóru leikt í landskappingini hjá kvinnum.

Undan kappingini varð avtalað annars gjørd við Yelena Barlov um, at hon skuldi venja liðið, men tað stóð skjótt greitt, at hetta ikki fór at verað nøkur varandi loysn.

Heldur enn at bíða, so valdi leiðslan í felagnum alt fyri eitt at senda útlendska venjaran heim, og ístaðin varð Svein Rógvi Nielsen – sum annars er ungdómsvenjari í felagnum – biðin um at átaka sær uppgávuna at venja fremsta kvinnuliðið.




*Tað var ein væl nøgdur Svein Rógvi Nielsen, sum leygardagin kundi seta kós norðureftir móti Klaksvíkini, har stór móttøka bíðaði honum og leikarunum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Í dag – fimm mánaðir seinni – er meistaraheitið hjá liðnum ein veruleiki, men sjálvur heldur Rógvi ikki, at gullið var eitt evni yvirhøvur, tá venjaraskiftið fór fram.

- Málsetningurin hjá okkum tá var fyrst og fremst at stabilisera liðið. Vit høvdu eisini tríggjar sera truplar á skránni, tá VÍF, VB og Neistin komu á vitjan. Móti VÍF taptu vit tepurt, men síðani gjørdist talan um spennandi sigrar á VB og Neistanum, og so gekk bara ein veg.

Stjørnan vann eisini tað, sum var eftir av grundspælinum, og tær lógu tí á odda, tá farið varð undir endaspælið. Í steypakappingini gekk eisini væl, og sjálvur sigur Rógvi, at tað var eftir finalusigurin á VB, at hann av álvara fekk eina sterka trúgv upp á meistaraheitið.

- Sjálvandi hevði onkur tosað um tað áðrenn, men í bussinum heim ta ferðina fekk eg av álvara at kenna, hvussu nógv kvinnurnar vildu royna eftir hesum. Uttan at eg hevði sagt nakað, avtalaðu leikararnir, at hetta fram til kappingarlok var eingin, sum skuldi í býin. Heldur ikki tað kvøldið.

- Og sami seriøsi stemningurin hevur alla tíðina merkt hópin. Góð uppmøting og hørð venjing hava verið miðvísa uppskriftin, og í dag gav hetta eisini úrslit. Bæði tí vit ígjøgnum allan dystin megna at halda okkara uppleggi til dysitn, og eisini tí vit seinastu løtuna høvdu tað yvirskotið, sum skuldi til fyri at tryggja sigurin, segði Rógvi Nielsen.

# Kappingin var eitt vónbrot

**Hóast hann sum Stjørnu-venjari fegnaðist um gullið, so harmaðist Svein Rógvi Nielsen sum landsliðsvenjari um kappingina, sum hann helt vera eitt stórt vónbrot**

HONDBÓLTSTOS
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Umframt at hann stóran part av árinum hevur vant kvinnuliðið hjá Stjørnuni, so er Svein Rógvi Nielsen eisini partur av venjaraparinum hjá føroyska kvinnulandsliðnum í hondbólti.

Og hesum viðvíkjandi var fagnaðurin um at kalla lidnu hondbóltskappingina als ikki stórur.

- Eg má bara siga, at kappingin í ár hevur verið eitt stórt vónbrot. Tað hava verið trý lið, sum hava kappast í oddinum, meðan hini hava verið nakað nakað nógv veikari, og sum landsliðsvenjari má eg siga, at tað er keðilig støða.

- Fyrst og fremst verða leikararnir ikki nóg hart matchaðar í einstøku dystunum, og tað í sjálvum sær er ikki serliga mennandi hjá teimum. Hartil haldi eg, at fleiri av teimum leikarum, sum spæla við niðaru liðunum, væl kundu verið meira aktuellar til landsliðið, um tær dagliga vóru partur av eini meira miðvísari venjing. Eg skilji væl, um onkrar av hesum eru vónbrotnar um landsliðsúttøkuna, men fyri okkum er tað eisini eitt vónbrot, at hesir leikarar ikki hava ment seg meira, og kanska er tað eisini so, at tær til komandi ár eiga at umhugsa, hvar tær skulu spæla hondbólt, er bersøgna útsøgnin hjá Rógva Nielsen.

Og so leggur hann eisini at enda dent á, at áhugin fyri kappingini ikki er so stórur, sum hann kundi verið. Júst orsakað av tí sama.

- Tað sigur seg sjálvt, at tá tú spælir kanska fýra dystir á rað, sum tú kanst vinna við 20 málum, so verður áhugin fyri kappingini minni. Ikki tí at vit í Klaksvík skulu grenja í so máta, men generelt tykist hetta vera ein trupulleiki, og tað kann bara bøtast um hetta við øktum spenningi.

### Støðið er hækkað

Hóast landsliðsvenjarin í so máta kanska tykist heldur dapurt-skygdur, so fegnast hann tó kortini um, at støðið í føroyskum kvinnuhondbólti tykist vera hækkandi.

- Einki er at ivast í, at støðið hjá fremstu liðunum er væl hægri nú, enn fyri nøkrum árum síðani. Tað er bara spell, at hendan betranin av kvalitetinum ikki hevur fevnt um fleiri lið, tí við tí kundu vit fingið eina nógv meira spennandi kapping, sum samstundis hevði verið nógv meira mennandi fyri einstøku leikararnar, sigur altso annar partur av føroyska landsliðsvenjaraparinum at enda.